Avleiðingin sum hvarv

Nakað fyri jól kravdi Løgmaður, at ALS skipanin varð broytt beinanvegin, annars fór tað at fáa avleiðingar fyri Bjarna Djurholm, landsstýrismann og kanska fyri hann sjálvan eisini. Men onki hendi, og avleiðingar fekk tað heldur ongar

ALS
Áki Bertholdsen

Løgmaður hótti við avleiðingum fyri jól. Men tá ið tað ikki gekk, sum hann ætlaði, gloymdi hann alt um avleiðingar, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum

– Tað kann ikki góðtakast, at Føroya Løgmaður ber seg soleiðis at.

Á aðalfundinum í Starvsmannafelagnum seinasta leygardag fanst Gunnleivur Dalsgarð, formaður, hvassliga at løgmanni.

Hann minti á tað, sum var hent beint fyri jól í sambandi við ALS skipanina.

– Tá spældi løgmaður hart út og kravdi broytingar í ALS skipanini alt fyri eitt.

Í umsitingini vóru tey komin eftir, at ALS- gjaldið varð ein skattur, tí tað var skyldbundið hjá øllum at gjalda.

Og tað er bara Løgtingið, sum kann áleggja fólki skatt. Sostatt er ALS ikki í samsvari við stýrisskipanarlógina.

Og nú hevði landsgrannskoðarin spurt løgmann, hvat hann ætlaði at gera fyri at fáa viðurskiftini í rættlag.

Løgmaður kravdi tí at Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, beinanvegin broytti skipanina, so at ongin ivi var um lógargrundarlagið, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

– Víst var á, at ætlanin var at seta ein arbeiðsbólk at endurskoða ALS. Men tað kundi Løgmaður ikki bíða eftir. Hann vildi tí hava bráfeingisbroytingar í skipanini, so at lógargrundarlagið var fingið í rættlag.

Og hetta var so álvarsligt, at tað skuldi gerast beinanvegin, annars fór tað at fáa avleiðingar fyri landsstýrismannin í vinnumálum, Bjarna Djurholm, og kanska løgmann eisini. Talan var jú um, at sjálv stýrisskipanin var brotin og tað kundi hann ikki liva við.

Tað sum lá undir var, at ALS skipanin varð løgd undir figgjarmálaráðið og at inntøkurnar komu á figgjarlógina.

Men hvørki fakfeløg ella stýrið fyri ALS, lótu seg ikki taka av fótum og noktaðu at broyta skipanina í óðum verkum.

Endin var, at ongar broytingar vórðu gjørdar, men at ætlaði arbeiðsbólkurin varð settur at endurskoða skipanina.

Kann ikki góðtakast

Gunnleivur Dalsgarð sigur í ársfrágreiðingini hjá Starvsmannafelagnum, at ongin ivi er um, at politiska valdið hevur sera gott eyga á skipanum, sum hava eitt gott figgjarligt støði at standa á og roynir at kráma eftir hesum ognum, m.a. til at figgja tiltøk við, sum tað sjálvt ikki er ment at loysa.

– Hetta skulu vit leggja okkum í geyma. Men vit hava fult álit á okkara umboði í ALS-stýrinum, at her verður ikki gingið við til, at slaka í okkara krøvum og dýrtkeyptu rættindir.

Men hann heldur ikki, at tað kann góðtakast, at Løgmaður ber seg soleiðis at.

– Onki hendi í málinum uttan tað, sum alla tíðina var ætlanin og at arbeiðsbólkurin varð settur.

– Men avleiðingarnar, sum løgmaður hótti við, síggjast ikki aftur.

Gunnleivur Dalsgarð heldur, at hetta mest sær út sum um ein roynd at trýsta partarnar á arbeiðsmarknaðinum við hóttanum at góðtaka at ALS skipanin varð løgd undir landið.

– Tað kann als ikki góðtakast at landsins ovasta leiðsa slongir slíkir hóttanir út og soleiðis roynir at trýsta sín vilja ígjøgnum.

– Tá ið gongdin ikki verður, sum hóttanin og trýstið legði upp til, verður latið sum luft og ongin avleiðing stendst av hesum, segði Gunnleivur Dalsgarð.

Nú eiga fakfeløgini at fáa frið at gera sína egnu eftirløn

Starvsmannafelagið heldur lítið um mátan, sum Landsstýrið hevur handfarið eftirlønarmálið uppá, men nú eiga fakfeløgini at fáa frið til at byggja sínar egnu skipanir upp

EFTIRLØN
Áki Bertholdsen

– Meginreglan má vera, at tað er ein landsuppgáva at tryggja fólki eina ordiliga eftirløn. Men nú eiga fakfeløgini at fáa frið til at menna tær eftirlønarskipanir, tey eru farin undir.

Starvsmannafelagið hevur ógvuliga lítla virðing fyri mátanum, sum landsstýrið hevur handfarið málið um eftirlønarskipanina uppá.

– Eftirlønarmálið er eitt tað løgnasta politiska málið tey seinastu árini, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum, í ársfrágreiðing síni til aðalfundin seinasta leygardag.

Hann segði, at fyri umleið fimm árum síðani, varð lagt til brots av andbráðum landsstýrisfólki: Nú skuldi borgarin fáa eina eftirlønarskipan, sum veruliga fór at gera tað gjørligt at lívbjarga sær á ellisárum, samstundis sum fólkapensjónin skuldi avtakast.

Men síðani er snøgt sagt onki hent, segði formaðurin í Starvsmannafelagnum.

– Gamaní eru landsstýrisfólk farin frá og onnur komin í staðin. Men enn er sjabbið tað sama at nú skuldi okkurt henda og partarnir á arbeiðsmarknaðinum verða boðsendir fyrsta dagin til at orða ein eftirlønarpolitikk saman við myndugleikunum.

Skúgvaði alt til viks

Gunnleivur Dalsgarð segði, at tað seinasta, sum hendi, var, at sjálvur løgmaður, sum annars onki hevur við slík mál at gera, skúgvaði alt til viks og kunngjørdi einaferð enn, at nú verður tað.

– Hann barslaði við einum fundi, har allur arbeiðsmarknaðurin var boðin við, og har eftirlønarmálið eisini skuldi vera á dagskrá.

– Men hetta tiltak hansara var so út av lagi illa fyrireika, at mest sum allur arbeiðsmarknaðurin vendi tummilin niðureftir.

Formaðurin í Starvsmannafelagnum segði, at í veit hann ikki, hvat nú fer at henda.

Men at brúka arbeiðsmarknaðin til jarnbrot tí at hansara egna umsiting ikki fæst at virka, kann løgmaður gloyma alt um, segði hann.

– Nú hevur spuningurin um eftirløn ligið og rikist ímillum fleiri ymisk ráð hjá Landsstýrinum, til Løgmaður segði, at hann fór at taka um endan. Men tá ið hann sær, at hann ikki kemur longri, kallar hann arbeiðsmarknaðin á fund - fyri at fáa eina politiska kabal at ganga upp.

– Og á fundinum millum arbeiðsmarknaðin og Løgmann kom tað ikki fram fyrrenn allarseinast, at ætlanin er at fáa ein arbeiðsbólk at fáa greiði á eftirlønarskipanini.

– Men málið er so ógreitt, at tað bar ikki til hjá okkum at vera við. Skal arbeiðsmarknaðurin vera við, skal uppleggið vera púra greitt, sigur Gunleivur Dalsgarð.

Ligið sjóvarfallið av sær

Gunnleivur Dalsgarð sigur, at ongin ivi er um, at politiski myndugleikin eisini í hesum máli hevur ligið sjóvarfallið av sær.

Hann sigur, at nú hava tey flestu fakfeløgini sjálvi tikið hetta málið upp sjálvi, sum tað almenna hevur forsømt, og eru farin undir sínar egnu eftirlønarskipanir.

At fakfeløg seta sínar egnu eftirlønarskipanir í gildið, fritekur ikki tað tað almenna, tí tað er ein almenn uppgáva at tryggja øllum eina nøktandi eftirløn, sigur formaðurin í Starvsmannafelagnum

– Tað hava tey gjørt, júst tí at tey hava ikki álit á politikarunum. Nú eru vit komin hartil, at vit hava staðfest, at okkara skipanir skulu byggjast út og mennast til veruligar skipanir.Og nú vilja vit eisini hava frið til at menna og útbyggja okkara egnu skipanir, so at vit sjálvi kunnu byggja upp eina skipan, sum er nøktandi.

Hann legði tó dent á, at politiski myndugleikin skuldi gera sær greitt, at hann sleppur ikki undan at tryggja, at allir borgarar landsins hava eina so góða eftirlønar- og tryggingarskipan, at at teir væl og virðiliga fáa lívbjarga sær á ellisárum ella um illa vil til, áðrenn.

Hann sigur at øll hava ikki eins góðar skipanir. Og í hesum førum er tað sum í so nógvum ørum førum, at tey, ið eru á ovastu rókunum og sostatt skuldu havt bestu møguleikarnar at spara, ið hava bestu skipanirnar, men tey,sum hava lægri løn framvegis mugu berjast fyri at bøta um sínar skipanir, sum í flestu førum eru alt ov vánaligar. Haraftur koma so eisini tey, sum als ongar skipanir hava og tey sum ikki eru í lønandi vinnu.

Gunleivur Dalsgarð sigur, at meginreglan má verða, at eftirlønarskipanir eru ein almenn uppgáva.

– Í øllum førum eigur hetta at vera reglan í einum vælvirkandi vælferðasamfelagi. At so alt fleiri fakfeløg seta sínar egnu skipanir á stovn, sigur meira um væntandi álitið, ið feløgini hava á politikarar okkara.

– Virðingin fyri teirra handfaring av hesum málinum er ongin, sigur Gunleivur Dalsgarð.

Næskir norðurkoreanskir flogskiparar

Tað var eitt kanningarflogfar av hesum slagnum, sum norðurkoreansk jagaraflogfør steðgaðu yvir Japanska Havinum.

Minni enn 20 metrar vóru millum eitt norðurkoreanskt jagaraflogfar og eitt amerikanskt kanningarflogfar. USA fer at mótmæla

NORÐURKOREA-USA
Árni Joensen:

Amerikanska stjórnin fer at mótmæla, at fýra norðurkoreansk jagaraflogfør steðgaðu einum amerikanskum kanningarflogfari í altjóða loftrúmi yvir Japanska Havinum sunnudagin.

Sambært verjumálaráðnum Pentagon var eitt av teimum norðurkoreansku flogførunum minni enn 20 metrar frá amerikanska flogfarinum. Sagt verður eisini, at ein av teimum norðurkoreansku flogskiparunum nýtti radaran á ein slíkan hátt, at tað sá út, sum at hann ætlaði at leypa á amerikanska flogfarið.

Pentagon sigur, at norðurkoreansku flogførini fylgdu kanningarflogfarinum í 22 minuttir, áðrenn tey tóku seg burtur. Amerikanska flogfarið vendi aftur til støðina í Kadena í Japan.

Ein talsmaður hjá Pentagon segði í gjár, at kanningarflogfarið var á einari regluligari ferð, og at USA fer at mótmæla tilburðinum. Hann segði, at USA fer at ráðføra seg við síni sameindu í økinum, áðrenn mótmælið verður orðað.

Jeff Davis, sum er talsmaður hjá Pentagon, sigur, at seinasti tilburðurin av hesum slagnum var í 1969, men ta ferðina skutu norðurkoreansk flogfør eitt amerikanskt kanningarflogfar niður. Øll tey 31, sum vóru við amerikanska flogfarinum, doyðu.

Pávin ætlar at halda friðarrøðu í ST

Jóhannes Páll pávi Annar umhugsar at fara til New York at halda eina friðarrøðu í ST-trygdarráðnum

IRAK-KREPPAN
Árni Joensen:

Jóhannes Páll pávi Annar hevur ongantíð dult fyri, at hann er ímóti amerikansku ætlanini at leypa á Irak, og í dag fer sendimaður hansara, kardinalurin Pio Laghi, til Washington at tosa við George W. Bush, forseta fyri at fáa hann at loysa kreppuna við Irak á friðarligan hátt.

Vil amerikanski forsetin ikki lurta eftir kradinalinum, ætlar tann 82 ára gamli pávin sær at fara til New York at halda eina serliga friðarrøðu í ST-trygdarráðnum. Fer pávin til USA, ætlar hann eisini at halda eina bøn á staðnum, har World Trade Center stóð.

Jóhannes Páll pávi hevur sagt, at eingin rættvísgera eitt álop á Irak, men talsmenn hjá Bush hava fyrr sagt, at forsetin fer neyvan at lata seg ávirka av hugsan pávans. Kortini er tað ein sannroynd, at pávin hevur stóra ávirkan á fleiri amerikanskar stjórnarlimir, sum verða mettir sum trúgvandi menn.

Misnýta livandi skjøldur

Fleiri av teimum umleið 200 útlendingunum, sum fóru til Irak at virka sum livandi skjøldur í einum møguligum amerikanskum álopi á landi, eru farin heimaftur.

Millum teirra, sum fóru til Irak, vóru fleiri norðmenn, men nú eru bara fimm eftir. Norska uttanríkisráðið sigur, at irakskir hermenn eru hjá teimum alla tíðina, og tey fimm hava eins og hinir útlendingarnir fingið boð um, at tey skulu virka sum livandi skjøldur á irakskum herstøðum og orkuverkum, ið mugu metast sum amerikansk bumbumál. Fýra av teimum fimm norðmonnunum eru í løtuni á einum vatnverki uttan fyri Bagdad.

Uttanríkisráðið í Oslo sigur, at iraksku myndugleikarnir misnýta tey útlendsku friðarfólkini. Tað sama sigur felagsskapurin Human Shields, sum sigur, at fleiri av hansara stuðlum eru farnir úr Irak.

Tað gloymda kríggið

Rockstjørnan Bono spyr nú, hví fólk í milliónatali ikki fara út á gøturnar at mótmæla tí gloymda kríggnum í Afrika, kríggnum ímóti AIDS.

Bono vísir á, at í síðsta mánað gingu fleiri milliónir fólk mótmælisgongu ímóti tí ætlaða kríggnum við Irak. Hann sigur, at verður einki munagott gjørt alt fyri eitt, fara milliónir av fólki at doyggja av AIDS í Afrika.

– Tað frøir meg at síggja, at fleiri milliónir fólk royna at verja mannalív í Irak, men í Afrika fara tvær milliónir fólk at doyggja tey bæði næstu árini, tí tey fáa ikki heilivág. Hví mótmæla fólk ikki hesum gloymda kríggnum? Hvussu nógv virða við lívið hjá einum svørtum, spyr tann kenda tónleikastjørnan, sum herfyri varð innstillaður til friðarheiðursløn Nobels.

Hatta tosa vit ikki um!

Amerikanska stjórnin vil ikki gera viðmerkingar til tíðindini um, at amerikanarar hava avlurtað alt samskiftið hjá sendinevndunum hjá hinum limalondunum í ST-trygdarráðnum.

Tað var bretska blaðið The Observer, sum fyri nøkrum døgum síðani avdúkaði, at amerikanarar hava avlurtað alt samskiftið hjá sendinevndunum hjá øllum londunum í trygdarráðnum uttan Bretlandi. Sambært The Observer var tað tann serliga trygdartænastan NSA, sum stóð fyri avlurtingini. Endamálið var at fylgja við, hvat hini londini ætlaðu sær at gera í Irak-málinum.

Hvítu Húsini vilja hvørki vátta ella avsanna tíðindini. Talsmaðurin hjá foprsetanum, Ari Fleischer, sigur, at stjórnarumsitingin ger ikki viðmerkingar til nakað, sum hevur við fregnar- ella trygdartænasturnar at gera.

Avnoktar holocaust

Svenski løgfrøðiprofessarin Gøran Englund avsannar, at fleiri milliónir jødar doyðu í gassrúmum í teimum týsku týningarlegunum undir seinna heimsbardaga.

Við Aftonbladet sigur Gøran Englund, at tað finnast eingi prógv fyri, at gassrúmini yvirhøvur vórðu nýtt. Sambært teirri vanligu uppfatanini doyðu umleið tríggjar milliónir jødar í teimum týsku gassrúmunum, meðan aðrir tríggjar milliónir jødar vórðu fyribeindir á annan hátt.

Men hetta er ikki so, sigur Gøran Englund. Hann sigur, at serfrøðingar, sum hava kannað tey gomlu týsku gassrúmini, komu til ta niðurstøðu, at tey vórðu ongantíð nýtt. Hann sigur, at tað finnast heldur eingi skjøl, sum prógva, at jødar vórði tiknir av døgum í teimum týsku gassrúmunum.